# Jógvan við Keldu: Løgmaður



*– Eg visti longu sama kvøld, at eg hevði dummað meg. Eg hevði alment úttalað meg um eini privat hjún í einum máli, sum eg ikki sjálvur umsat. Tað var býtt, sigur Jógvan við Keldu um óhepnu orðingarnar viðvíkjandi Rapa-hjúnunum*

*Mynd: Bárður Lydersen*

**- Eg hevði rent meg í eitt fjall. Valið stóð ímillum at halda fast um linjuna ella at fylgja boðunum og bróta lógina. Eg valdi at koyra eftir lógini, sigur Jógvan við Keldu, fyrrverandi landsstýrismaður við innlendismálum. Ein bóltur var farin á rull, og landsstýrismaðurin skilti, at hetta helst fór at enda galið**

SAMRØÐA
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Tað er mánamorgun í oktober 2005. Jógvan við Keldu er biðin um at koma á fund í flokshølinum á Gamla Apoteki. Øll tingmanningin hjá Fólkaflokkinum er møtt upp. Jógvan við Keldu heldur fast við, at hann ikki fer við egnum vilja. Og tá er einki annað at gera. Avgerðin er tikin. Ein nýggjur landsstýrismaður skal finnast.

Men avgerðin hjá Fólkaflokkinum hendan mánamorgun kom ikki óvart á landsstýrismannin úr Klaksvík. Tað hevði leingi verið tutlað í hornunum, og bólturin hevði rullað í longri tíð, meðan spenningurin millum landsstýrismannin og løgmann longu var har frá fyrsta degi.

### Hvørki vónbrotin ella bittur

Vit sita í skrivstovuni hjá Jógvani við Keldu í Klaksvík. Á niðastu hædd í einum stórum hvítum húsum. Vit hava biðið norðoyartingmannin um eitt prát. Hann hevur játtað, og hann veit, hvat samrøðan fer at snúgva seg um. Evnið er viðkvæmt, og hóast tingmaðurin tykist róligur, so hómast ein álvari í eygunum.

Jógvan við Keldu náddi at sita tvey ár sum landsstýrismaður við innlendismálum, áðrenn hann bleiv koyrdur frá. Av løgmanni og av sínum egnu partamonnum. Men hann er ikki bittur.

- Eg eri ikki ein maður, sum gangi vónbrotin ella bittur. Eg taki dystin upp, meðan hann er. Og tá hann er taptur, so er hann taptur. Eg havi verið í politikki í meir enn 30 ár. Eg veit, hvat tað inniber. Nógva gleði og nógvan spenning. Men eisini nøkur vónbrot, og tá er týdningarmikið ikki at lata seg koyra runt av teimum. Men at koma víðari. Eg havi eitt skelti frammanfyri mær hvønn morgun, tá eg vakni. “Today is the first day of the rest of your life”. Tað er tað, eg koyri uppá. Tá eg eri komin til eitt punkt, seti eg kósina av nýggjum, greiðir garvaði tingmaðurin frá, meðan hann skeinkir sær kaffi.

### Vildi yvirtaka útlendingamálið

Tá breiða samgongan verður skipað í 2003, og greitt er, at fyrrverandi løgmaður, Anfinn Kallsberg ikki fær nakran landstýrissess, kemur tað ikki sum nakað sjokk, at hin tingmaðurin úr Norðoyggjum sleppur framat.

Jógvan við Keldu er skjótur at taka av, tá sessurin í nýstovnaða Innlendismálaráðnum stendur honum í boði. Men hann veit, at tungar uppgávur eru fyri framman. Serliga í útlendingapolitikkinum. Málið um 17 teilendingar í Skálavík koyrir í hæddini, og fútin er komin uppí. Eisini innan ítróttin stinga trupulleikar seg upp viðvíkjandi uppihaldsloyvum. Arbeiðsloysið er voksið, og útlendsk ítróttarfólk vita ikki, um tey eru keypt ella seld.

- Útlendingamálið er koyrt fast, og eg síggi beinanvegin, at her má koyrast hart ígjøgnum. Eg sigi við míni embætisfólk, at tey mugu fylgja lógina, óansæð hvussu illa umtókt tað er millum fólk. Eg skilji beinanvegin, at eg fari at fáa ein trupulleika við útlendingamálum, men eg ivist ikki í, at um eg fái loyvi at koyra linjuna ígjøgnum, so enda vit við einum góðum úrsliti, greiðir Jógvan við Keldu frá.

Hann heldur fast um, at besta loysnin hevði verið at yvirtikið alt hetta lógarøkið, sum er ein ellubiti ímillum Innlendismálaráðið, løgregluna og danska útlendingastýrið. Men undirtøka er ikki fyri yvirtøku, og tískil er neyðugt at halda seg til donsku lógina, sum sigur, at útlendingar ikki kunnu fáa arbeiðsloyvi, um arbeiðsloysið er.

### Á fund við »lítlu samgongu«

Spenningurin kom so líð-